



# Avloysari

Eitt fulltíðarstarv sum avloysari fyri roknskapar-, móttøku- og avgreiðslufólk í farloyvi í tíðarskeiðinum 1. august 2006 til 1. august 2007 er leyst at søkja.

Umframt bókhald og vanligt skrivstovuarbeiði, skal tann, ið settur verður, eisini luttaka í øðrum útflutningsfremjandi arbeiði, so sum at svara útlendskum fyrispurningum um møguligar samstarvsfyritøkur í Føroyum og at vera við í arbeiðinum at fyrireika og gjøgnumføra handilsferðir og framsýningarátøk uttanlands.

Vit hugsa okkum, at tú hevur kunnleika til alt vanligt skrivstovuarbeiði og eisini dugur at arbeiða við FSL - Fíggjarstýringsskipan Landsins.

Arbeiðsøkið hjá Menningarstovuni er rættiliga fjølbroytt við nógvum spennandi uppgávum, ið seta krøv um góð samstarvsevni. Tí vænta vit, at tú sum persónur er fryntligur og fyrikomandi og hevur góðan kunnleika í bæði føroyskum og enskum og lættliga kann samskifta við bæði føroyskar og útlendskar fyritøkur.

Setanarviðurskiftini eru sbrt. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir vera at senda Menningarstovuni í seinasta lagi 27. juli 2006.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Menningarstovan**
*Faroe Islands Trade Council*
Bryggjubakki 12 · Postrúm 259 · 110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær ti Kjartan Kristiansen, 353100 ella 216117.




Forelskað?

Vís tað í Sosialinum




# Leyst starv

**Starvsfólk til Heimið við Vallalíð**

Tvey føst størv og tvey fyribils størv vegna barnsburðarfarloyvi eru leys at søkja.

**Í fast starv verður søkt eftir**
einum sjúkrarøktarfrøðingi í starvsbrøk 0,5 og einum heilsurøktara í starvsbrøk 0,5 at byrja 1. august 2006 ella skjótast til ber.

**Í fyribils starv verður søkt eftir**
einum heilsurøktara í starvsbrøk 0,75 til setan frá 1. september 2006 til 31. august 2007 og einum heilsuhjálpara í starvsbrøk 0,75 til setan frá 1. november 2005 til 31. mai 2007.

**Vit bjóða**
eitt spennandi og mennandi starv, har starvsfólkini eru saman um at skapa eitt gott og hugnaligt heim fyri 16 búfólk, sum eru minnisveik. Arbeitt verður útfrá eini sosialpsykologiskari tilgongd, sum er merkt av innliti, umsorgan, nærleika og virðing fyri tí einstaka menniskjanum.

**Søkt verður eftir fólki, sum**
- hevur hug og hegni at arbeiða við fólki, ið eru minnisveik
- er til reiðar at bróta uppúr nýggjum og ganga nýggjar leiðir
- vil verða við til at byggja upp eitt heim, sum er merkt av lívi og trivna
- dugir væl at samstarva og samskifta við onnur
- er motiverað og fleksibul
- kann arbeiða í skiftandi vaktum

**Løn og setunarviðurskifti**
Sambært avvarðandi fakfelag

**Umsókn**
við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal merkjast »Vallalíð« og verða Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 31 juli 2006.

**Nærri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Halldis Joensen, deildarleiðara, tlf. 302456 / 213002.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**
www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**

www.sosialurin.fo



# Kunngerð

**Serstaka byggisamtykt nr. 7**

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 29. juni samtykti broytingar í serstøku byggisamtykt nr. 7.

Ætlaða broytingin er, at ásetingarnar fyri matr. nr. 1306b, Tórshavn, verður broytt frá at vera A2 øki til stakhús, til at verða øki E til alment endamál.

Tilfar um ætlaðu broytingina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 17. juli til og við 7. august 2006, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga áðrenn 17. oktober 2006.

**Tórshavnar kommuna**





**Útferðir í Norðoyum:**
Frá Hvannasundi og norður um Enniberg, ella runt Fugloy ella Svínoy.
Eisini beinleiðis til Svínoy og Fugloy eftir avtalu.
Vit eru til taks alt døgnið.
Ring: m/b. Alpha Pilot
telefon 22 08 49


VINNUHÚSIÐ
*House of Industry*

# Summarfrí

Skrivstovan er stongd vegna summarfrí í viku 30 frá 24. juli til 30. juli.

Í átrokandi førum ber tó til at ringja, sí telefonnummar á heimasíðu okkara www.industry.fo

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Smærugøta 9A • FO- 110 Tórshavn
Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

Lesið Sosialin - so eru tit við